Sosialurin


## Færri fiskavirkir

Í Noregi er talið á fiskavirkjum, sum arbeiða hvítan fisk, minkað nógv tey seinastu tíggju árini. Serliga í Troms eru nógv virkin horvin í hesum tíðarskeiðinum. Í 1995 vóru 41 fiskavirkir í Troms, sum arbeiddu hvítan fisk, men í dag eru tey bara 23, og í Finnmørkini eru átta virkir latin aftur. Trupulleikin er, at hesi fiskavirkini forvinna ov lítlan pening, og sambært fiskimálaráðnum er tað ikki sannlíkt, at tey mistu arbeiðsplássini koma aftur.

## Eingir handverkarar



Fleiri danskar byggiverkætlanir steðga, longu áðrenn tær rættiliga eru komnar í gongd. Byggiharrar og arkitektar bjóða fleiri arbeiði út, men til fánýtis, tí byggifyritøkurnar hava ov fáar handverkarar til at átaka sær uppgávurnar. Úrslitið er, at hvørki tað almenna, byggifyritøkur ella einstaklingar fáa handverkarar at átaka sær nýbygging ella umvæling, og tí verða fleiri verkætlanir útsettar og í ringasta føri sleptar, skrivar ritzau.



*Stuart Williams heldur Eivør vera fantastiska*

*mynd: nud*

## Eivør er fantastisk og Teitur er kul

**Á Funky Faroe Islands sýnisglugga tiltakinum herfyri í Somerset House mitt í London var fitt av fólki úr tónleikaídnaðinum, og skotsmálini til føroysku listafólkini vóru sera góð.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir tiltakið tosaðu vit við tónleikatíðindamannin Stuart Williams og bookingagentin Paul Wilson

Stuart Williams skrivar millum annað fyri bløð sum Mojo og Kerrang. Stuart var komin fyri at uppliva Eivør og Teit aftur, tí hann upplivdi tey á G!Festivalinum í summar og heldur, at tey bæði eru talentir út yvir tað vanliga. Tey eru ikki bara føroysk, men megna at fevna víðari. Tey eru bæði dugnaligir sangskrivarir. Williams nevnir røddina hjá Eivør, sum heilt fantastiska við einum heilt frálíkum instrumentalum kontrolli. Eivør er ein kommanderandi stjørna, ið fer at íblása trúskap til hennara, segði bergtikni Stuart Williams.

Paul Wilson er bookingagentur fyri nøvn sum Tracy Chapman. Hann var sera væl nøgdur við tað, ið hann sá á føroyska sýnisglugga tiltakinum.

- Eivør hevur eina fantastiska rødd, segði Wilson.

Men tað tyktist sum Teitur var tann, ið veruliga fangaði áhugan hjá Wilson.

- Teitur er fantastiska kul, og ber seg á ein sera kulan hátt. Sangirnir hjá teimum báðum eru sera góðir og bæði Teitur og Eivør kundu gjørt um seg á altjóða marknaðinum. Tað er greitt, at Teitur kann verða heilt stórur, somikið dugdi eg at síggja, segði Paul Wilson eftir framførsluna í Somerset House.

# ST og World Bank




**24. oktober var almenni ST dagurin. Vit hoyra oftani um ST, men spurningurin er um vit vita so nógv um felagsskapin. Hvat vit halda um hann ella ikki, so er ST vorðið ein umráðandi partur av heimsskipanini og er einasti savnandi felagsskapurin sum er. ST hevur eisini greinar, sum eru meira tengdar at búskapi, fíggjarskipanum og handli, sum komið verður inn á. Fyrst eitt sindur um ST.**

BÚSKAPUR

*Bogi Eliasen*
*bogi_eliasen@hotmail.com*

ST er ikki ein heimsstjórn, ST er felagsskapurin hjá núverandi limunum, altso heimsins fullveldislondum. Sigast kann, at ST var úrslitið, sum vinnandi londini í seinna heimsbardaga samdustum. Men ST var ikki fyrsti heimsfelagskapurin. Eftir ræðuleikarnir undir fyrra veraldarbardaga var semja um at gera eina heimsskipan, sum skuldi tryggja, at slíkt ikki tók seg upp aftur.

Fólkasamgongan, sum felagsskapurin nevndist, var ógvuliga idealistiskur og kláraði heldur ikki at fyribyrgja eitt nú 2. heimsbardaga. Fólkasamgongan var í stóran mun bygd á eina hugsjón um rættvísi. Ræðuleikarnir undir 2. veraldarbardaga og royndirnar frá Fólkasamgonguni elvdu til, at nýggi felagsskapurin bleiv bygdur við ordan og javnvág sum beinagrind. Og millum annað tí varð avgjørt, at Trygdarráðið skuldi hava fimm fastar limir, sum tá vóru tey valdsmiklastu londini.

Men ST er meira ein bara orrustur. Nógv verður eisini arbeitt við fíggjar- og búskapar-, og handilsviðurskiftum,sum m.a. sæst í sonevndu World Bank Group, IMO og WTO.

### Búskapur

Búskapur hevur stóra ávirkan á, hvussu lond og landspartar klára seg. Búskaparviðurskifti er ógviliga grundleggjandi fyri støður. Tí hevur ST eisini langt dent á at hava